


# Atlantic Airways klárt til at flyta oljuarbeiðarar

**Jan Müller**

07.05.2014 - 20:28

Oljan.fo

Teir mongu føroysku veitararnir til komandi boringarnar á landgrunninum gera seg í hesum døgum klárar til at veita fyristøðufelagnum Statoil ymsar vørur og tænastur. Ein av teimum stóru veitarunum er Atlantic Airways, sum hevur gjørt avtalu við Statoil um at flúgva oljufólk  millum boripall og flogvøllin í Vágum og millum Føroyar og Norra.

Tað er nakað síðani, at tyrlan, sum skal brúkast til flutningin millum boripall og floghavn, kom til landið. Hon er av slagnum AW139, ið er sama slag sum Atlantic Airways keypti í 2008, men seldi í 2010 og sum varð leigað aftur í samband við flúgvingina fyri Statoil í 2012.

AW139 tyrlurnar vera fyri tað mesta brúktar at flyta fólk millum land og pallar kring allan heim, men tær vera eisini brúktar til onnur endamál, so sum til leiting og bjarging (SAR). Tyrlan, sum Atlantsflog hevur leigað, er tó ikki útgjørd til SAR flúgving, men er serútgjørd til ferðafólkaflutning í oljuvinnuhøpi.

AW139 vera frammleiddar í Italia, upprunaliga í samstarvi millum italsku fyritøkuna Agusta og amerikanska Bell Helicopters undir navninum AB 139, men seinni við heitinum AW139, sum stendur fyri Agusta Westland, eftir at bretska Westland keypti partin hjá Bell.

Fyrsta AW139 fleyg í 2001, og síðani eru fleri enn 600 tyrlur av slagnum AW139 bygdar.

Tyrlan rúmar 15 ferðafólkum og tveimum flogmonnum, men henda tyrlan hevur pláss fyri 12 ferðafólkum. Hetta kemst av, at hon hevur breiðari setur.

Tyrluna eigur kanadiska felagið Canadian Helicopter Corporation. Felagið hevur heimstað í Vancouver í Canada, men hevur fleri deildir kring allan heim. Ma. eina deild í Bretlandi, har tyrlan, sum Atlansflog hevur leigað, helt til áðrenn hon nakað herfyri varð flogin til Føroyar.

Tyrlan er leigað í 6 mánaðir, men við møguleika at longja leigusáttmálan, um so er at boringarnar í Føroyum draga út.

Viðvíkjandi sjálvari flúgvingini fyri Statoil, so koma allir tyrlupilotarnir hjá Atlantic Airways at flúgva út á Hercules. Teir býta seg upp, soleiðis at tei skiftast at flúgva SAR vakt og Off Shore vakt.

Enn er ikki heilt greitt, nær sett verður á at bora, men tað verður óivað í vikuskiftinum.

Myndina av tyrluni, sum skal flúgva millum flogvøllin og pallin, hevur Andreas Mouritsen, flogskipari tikið.